## Nýtt og spennandi føroyskt mentanarrit

**Í sambandi við at nýggja mentanarritið "OUTSIDERmagazin er útkomið verður skipað fyri móttøku í Miðlahúsinum í Vágsbotni fríggjadagin kl. 17, har stigtakararnir báðir Kim Simonsen og Bergur Rønne Moberg fara at leggja ritið fram og greiða frá. Eisini fer Knút Háberg Eysturstein at spæla til hátíðarløtuna**

NÝTT BLAÐ
*Tíðindaskriv*

OUTSIDERmagazin nummar 1 er útkomið. Við eru greinar, ummæli, essays, nýggjar søgur eftir m.a. Einar Már Gudmundsson, Jóanes Nielsen. Í blaðinum eru eini 20 føroyskir og útlenskir skribentar, høvundar, listafólk og onnur, ið hava skriva, yrkt, gjørt grafikk og annað upprunatilfar. Við eru eisini greinar eftir Gunnar Ekelöf, Knút Háberg Eysturstein, Berg Rønne Moberg, Firouz Gaini og onnur.

Tema í hesum blaðnum er outsidarin innan mentan og list í Føroyum sum uttanlanda. Í blaðnum eru ferðafrásagnir úr Afrika og frá Europa. Kjak um globalisering og William Heinesen. Ummæli av nýggjum norðurlendskum høvundum og føroyskum rokktónleiki, sum t.d. 200 og Knút Háberg Eysturstein. Greinar um rokksøgu og um list í Føroyum í dag.

Blaðið er hesuferð 176 s. langt, er eins nógv ein innbundin bók í A5 støðd. Blaðið er at fáa í bókhandlum og stórum kioskum í Føroyum og kostar 165 kr. Í Danmark fæst tað í Føroyahúsinum og í ávísum føroyskum feløgum. OUTSIDERmagazin kann eisini bíleggjast á heimasíðuni hjá OUTSIDERmagazin: www.outsidermagazin.com

– Við hesum blað vilja vit skapa nakað heilt nýtt og serliga stimbra tey ungu til at skapa og skriva. Í blaðinum eru fleiri nýggir føroyskir yrkjarar og onnur hava skrivað stuttsøgur siga stigtakararnir Kim Simonsen og Bergur Rønne Moberg.

Kim Simonsen er blaðstjóri og hevur næst at sær Berg Rønne Moberg. Grafikarin er Høgni Egholm Magnussen, ið hevur verið sniðgevi og internetdesignari á blaðnum og á nýggju heimasíðuni www.outsidermagazin.com. Listamaðurin Ole Wich hevur illustrerað ein part av blaðnum.

Við í blaðbólkinum eru Svend Højgaard, ið lesur til bókavørð og stud.mag Agnar Jógvansson, BA. Jóan Petur Ludvig Trier og onnur, ið hava nógv góð hugskot og tankar um list, foto, bókmentir og annað. Forsíðuna hevur fotografurin Bárður Eklund gjørt.

**FAKTA**
OUTSIDER magazin
Data:Blaðið hevur A5 format og útkemur eina til tvær ferð um árið - tað skal seljast í Føroyum, Danmark og (seinni vónandi) um øll Norðurlond. Síðutalið skal vera 175-220. Bert perman, lýsingar og ávísar myndir eru í litum. Blaðið skal liva av lýsingum og øðrum stuðli.

## Musikkprísir í Miðlahúsinum



Hóskvøldið vóru musikkprísirnir til næmingar á Musikskúlanum frá Berlingske Tidende kappingini latnir í Miðlahúsinum. Og samstíðis spældu næmingarnir. Lesið frásøgn frá hesi stóru hending í vikuskiftisblaðnum.

Summarframsýningin:

# Føroysk myndlist inn í framtíðina

**Summarframsýningin í Norðurlandahúsinum er ein savnan av bæði eyðkennum og nýggjum rákum innan føroyska myndlist í løtuni - eitt áhugavert boð uppá, hvussu okkara myndlist kann koma at gera seg galdandi í altjóða høpi framyvir**

MYNDLIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Bárður lydersen*



*Á Summarframsýningini umboða tey trý Sigrun G. Niclasen, Edward Fuglø og Astri Luihn postmodernistiska rákið í føroyskari myndlist í dag*

Fríggjakvøldið 3. juni letur árliga Summarframsýningin í Norðurlandahúsinum upp. Við á framsýningini eru seks myndlistafólk, Edward Fuglø, Astri Luihn, Sigrun G. Niclasen, Torbjørn Olsen, Eyðun av Reyni og Ingálvur av Reyni, sum hava fingið hvør sín vegg at ráða yvir. Eitt fínt hugskot, sum undirstrikar eyðkennini bæði í húsinum og hjá teimum einstøku listafólkunum.

### Samljóð

Samljóðið millum málningarnar og hølið kemur kanska best til sín rætt á ovaru hæddini í Norðurlandahúsinum. Tað fyrsta, tú fært eygað á, er sokallaði Plakatveggurin, sum Edward Fuglø er sloppin at seta sín dám á hesuferð. Eitt sera hóskandi val, har ikki minst málingarnir 'Kulturpávar' og 'Mappudýr' hanga sum sjálvspeiskar viðmerkingar til okkum og okkara tíð

Á glasveggunum í Klingruni hanga løttu, fínligu og ljósu myndirnar hjá Astri Luihn á ein hátt, so tær næstan sveima sum ein partur av útsýninum. Hinumegin, á stóra vegginum, hanga máttmiklu og stóru myndirnar hjá Eyðuni av Reyni sum eitt slag av koloristiskum aftursvari, sum undirstrikar eyðkenda og skiftandi ljósspælið í stóra rúminum.

Smáu myndirnar á framsýningini hesuferð eiga Tórbjørn Olsen og Ingálvur á Reyni. Myndirnar eru nógvar í tali og støddin krevur, at tú sleppur nær at teimum. Hesar spæla sær ikki á sama hátt við innrættingina, og sera hóskandi hanga tær tí í Dansistovuni, har ikki so nógv annað kappast um uppmerksemið.

Á veg útaftur í garderobuna fáa myndirnar hjá Sigrun G. Niclasen okkum at steðga á - og undrast.

Ein av styrkjunum við eyðkendu symbolistisku málningunum hjá Sigrun er, eftir mínum tykki, teirra eginileiki at skapa eitt heilt nýtt listarligt forvitni í áskoðaranum. Ikki tað ringasta, tú kanst taka við tær útaftur av eini listaframsýning.

### Nýggj listabók

Listarliga fevnir Summarframsýningin í høvuðsheitum um tað kenda ekspressionistiska hjá Ingálvi, Eyðuni og Torbjørn til tað nýggjara postmodernistiska hjá Edwardi, Astri og Sigrun. Samstundis hava júst hesi seks listafólkini síni heilt serligu eyðkenni, sum bæði vísa á nakað eyðkent og nakað heilt nýtt innan føroyska myndlist í dag. Samlað er Summarframsýningin sostatt eitt gott boð uppá, hvussu føroysk myndlist kann koma at gera seg galdandi í altjóða høpi í framtíðini.

Eins og á Summarframsýningum árini frammanundan, hevur Norðurlandahúsið eisini hesuferð nýtt høvið til at geva eina nýggja føroyska listabók út. Í bókini Faroese Art lýsir Malan Marnerdóttir, professari og dr. phil, originala modernistiska dámin í føroyskari list, umframt stílin, sum serliga eyðkennir listina hjá teimum, sum eru við á framsýningini í ár.

Saman við umrøðuni av einstøku listafólkunum eru eisini prentaðar myndir av nøkrum av verkunum, sum eru at síggja í Norðurlandahúsinum beint nú.

Summarframsýningin er opin til 2. august og fer tá víðari til Danmarkar, Noreg og Íslands

# Náttúrugripasavnið opið mentanarnáttina

**Mentanarnáttina verður Náttúrugripasavnið á Debesartrøð opið til kl. 22**

MENTANARNÁTT
*Tíðindaskriv*

Dyrnar verða sum vanligt lætnar upp kl. 10 á morgni. Á savninum eru framsýningar av føroyskum djóra- og plantulívi umframt føroyskari jarðfrøði. Her fáa tey, ið vitja, møguleika fyri at fáa eina mynd av føroysku náttúruni.

Eitt nú verður jarðfrøðin í Føroyum lýst bæði við teksti, myndum og lutum. Harumframt ber til at kunna seg við føroyskt djóralív, t.d. ber til at síggja beinagrind av hvalum, skølt av avgusti og útstappaðan kóp. Eisini er nógv kunning um hval, eitt nú hvussu grindaboð vórðu borin í gomlum døgum. Tað ber til at síggja sera nógv av fiskasløgunum, ið eru undir Føroyum. Tað eru fleiri framsýningarskáp við útstappaðum fugli, eitt sýnir bjargafugl, eitt annað heiðafugl og eitt triðja smáfuglar, sum ikki eiga her, men sum einstøk ár vitja her í stórum tali. Tað ber til at síggja serlig fuglasløg í egnum framsýningarskápi, eitt nú ber til at síggja tveir bringuhvítar ravnar standa yvir reiðrinum hjá sær. Hetta ravnaslag er útdeytt nú. Í Føroyum verður mett, at uml. 50 fuglasløg eiga regluliga.

Tey, ið vitja, kunnu eisini nýta høvið til at vitja plantufrøðiliga urtagarðin á Debesartrøð. Í urtagarðinum eru uml. 150 føroysk plantusløg, sum eru tikin heim úr bø og haga og plantað har. Har eru bæði vanligar og sjáldsamar plantur, t.d. eru fleiri ymisk sløg av føroyskum píli. Harumframt er baraldur, sum er vanligur á einum staði í Svínoy, annars er hann sjáldsamur alla aðrastaðni í Føroyum.

Til samans eru uml. 330 føroysk plantusløg, so í urtagarðinum er knappliga helvtin av føroysku plantusløgunum at finna. Plantturnar eru væl merktar við skeltum.

Atgongukostnaðurin til savnið er kr. 20,-. Børn undir 14 ár sleppa ókeypis inn.